## Fáa nógvan stórhval



Tað hevur vignast væl hjá teimum norsku hvalabátunum í seinastuni, Í síðstu viku viðraði væl, og teir seks bátarnir fingu 107 hvalir við Bjarnoynna, í Barentshavinum og fram við norðurnorsku strondini. Norsku fjølmiðlarnir skriva, at higartil í ár hava hvalabátarnir fingið 156 stórhvalir, sum er at kalla tað sama sum um hesa tíðina í fjør. Tvey feløg á landi keypa veiðina, og nrsku hvalaveiðimenninir eru eisini nøgdir við úrtøkuna. Prísurin á tvøstinum liggur um 38 norskar krónur fyri kilo, og tann ásetti minstaprísurin er 30,50 krónur.

## ST fordømir Norðurkorea

Trygdarráðið hjá ST samtykti í nátt einmælt at fordøma Norðurkorea, tí landið framdi eina kjarnorkuroyndarspreinging gjáranáttina. Trygdarráðið sigur í samtyktini, at við royndarspreingingini hevur Norðurkorea gjørt ímóti fleiri altjóða samtyktum um landsins kjarnorkuvápnaætlan. Tey 15 limalondini í trygdarráðnum mæla stjórnini í Norðurkorea til at halda samtyktirnar hjá ST og at gevast við tílíkum royndarspreingingum. Fyribils bendir einki á, at Norðurkorea letur seg ávirka av mótmælum uttaneftir, tí í nátt boðaði stýrið í Pyongyang frá, at landið fyrireikar seg til eina rakettroynd, sum verður í dag ella í morgin.

# Í Óðamansgarði fyri fullum húsi

**Fyrsta føroyska operan fekk eina stórsligna móttøku, tá hon varð frumsýnd í Íslandi. Íslendska Tjóðleikhúsið var fullsett, og fremstu umboð íslendinga nýttu høvið at bera føroyingum heilsu**

OPERA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Fyrsta føroyska operan, »Í Óðamansgarði« eftir Sunleif Rasmussen, ið byggir søguna hjá William Heinesen, um Marselius og Stellu Kristinu, varð um vikuskiftið framførd tvinnar ferðir í Tjóðleikhúsi Íslands í Reykjavík*
*mynd: ©Martin Sirkovsky*

Føroya fyrsta opera, »Í Óðamansgarði« eftir tónaskaldinum Sunleif Rasmussen, varð fríggjakvøldið frumsýnd í Tjóðleikhúsinum í Reykjavík.

Undir leiðslu av Bernhard Wilkinson varð operan frumsýnd fyri fullsettum húsi, og millum gestirnar til føroysku frumframførsluna á íslendska tjóðpallinum vóru Ólafur Ragnar Grímsson, forseti Íslands og Katrín Jákupsdóttir, ráðharri Íslands við undirvísingar-, og granskingar- og mentamálum.

Operan »Í Óðamansgarði« varð upprunaliga skrivað til tónleikabólkin Aldubáruna í sambandi við 10 ára hátíðarhaldið hjá bólkinum. Hon varð um vikuskiftið framførd tvær ferðir, fríggja- og leygarkvøld, sum partur av Listarhátíð Íslands, ið verður mett sum størsta listatiltak íslendinga.

### Útnorðursamstarvið betrast

Verkið er framført í samstarvi millum millum Tjóðpall Føroya og íslendska Tjóðleikhúsið, og sungu íslendsku leikararnir á føroyskum. Hetta helt Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sum var einasta almenna føroyska umboð á túrinum, verða sera sjáldsamt.

Librettoin, ið er teksturin í eini opera, varð vístur upp á veggin, so øll kundu fylgja við.

Dánjal Hoydal hevur skrivað librettoina, ið byggir á søguna hjá William Heinesen um Marselius og Stellu Kristinu, sum í broytingarárunum møtast á fremmandari grund, nevniliga í garðinum hjá einum óðum manni í Havn.

Almennu íslendsku umboðini hildu talu fríggjakvøldið og heilsaðu føroyingum við hetta sjáldsama høvi. Eisini Heðin Mortensen røddi, takkaði fyri innbjóðingina og ynskti eitt enn sterkari mentanarligt samstarv millum Tórshavn og Reykjavík.

# Hitt ein heilsurøktara

**Sambandið millum borgaran og teir 300 heilsurøktararnar í landinum skal betrast, og ljós varpast á heilsurøktaran í Føroyum. Tað er endamálið við verkætlan, ið Almanna- og heilsurøktarafelagið og Føroya Psykiatrifelag eru farin undir**

HEILSUVERKIÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Almanna- og heilsurøktarafelagið og Føroya Psykiatrifelag eru farin undir vikulanga verkætlan, ið skal varpa ljós á heilsurøktaran í Føroyum og knýta samband millum teir 300 heilsurøktararnar í landinum og borgaran*

Í gjár byrjaði ein vikulang verkætlan, ið skal varpa ljós á heilsurøktaran í Føroyum og knýta samband millum teir 300 heilsurøktararnar í landinum og borgaran.

Høvuðsendamálið við verkætlanini er at fáa samband við fólk og greiða frá hvat ein heilsurøktari er, og hvat hann ger. Í gjár byrjaði verkætlanin millum annað við eini sjónvarpslýsing.

Verkætlanin varir í eina heila viku, og endar fríggjadagin 29. mai við umfatandi tiltøkum, sum verða samstundis í SMS í Havn, í miðbýnum á Tvøroyri og í Klaksvík.

Á hesum tiltøkum verður fokus sett á heilsu, og bjóða tey fólki ein svalligan vatnsopa, frukt og at máta blóðtrýstið.

- Eftir át og mát fara vit til verka undir heitinum »Hitt ein heilsurøktara«. Vit geva fólki faldarar og okkum sjálvum góðar stundir at práta um okkara yrki, sigur Almanna- og heilsurøktarafelagið.

## Elin Heinesen ikki longur stjóri



Elin Heinesen, ið hevur verið stjóri á Samvit í fleiri ár, kann ikki longur kalla seg stjóra. Síðan stovnurin varð lagdur inn undir Uttanríkisráðið fyrst í apríl, hevur ikki longur verið neyðugt við einum stjóra. Elin Heinesen er tó ikki vorðin arbeiðsleys, men kann nú ístaðin kalla seg leiðandi miðlaserfrøðing undir Uttanríkisráðnum.
-RN